## Clickhaze til Íslands at spæla



**Clickhaze fer seinni í oktober mánaði til Íslands á konsertferð. Tríggjar konsertir eru í løtuni á skránni teir 10 dagarnar, bólkurin verður í Íslandi**

KONSERTFERÐ
*Eyðun Klakstein*

Tann 18. oktober fer Clickhaze til Íslands á konsertferð. Fyribils eru tríggjar konsertir á skránni í Reykjavík, men tað kann gerast til fleiri.

Tað er Kiddi Sæmundsson, sum hevur syrgt fyri ferðini og hevur skipað fyri konsertunum.

Hetta er fyrstu ferð, at Clickhaze fer til Íslands at spæla. Tey hava verið í flestu av hinum norðurlondunum og spælt í hesum árinum.

– Nú fyrireika vit okkum til ferðina, okkurt nýtt verður kanska tikið fram, sum ikki hevur verið spælt áður, og kanska verða onkrir spennandi gestir á skránni, siga tey í Clickhaze.

Clickhaze kemur eftir ætlan heim aftur tann 28. oktober.

## Ein handilin til tey ungu

NÝGGJUR HANDIL
*Tíðindaskriv*

Í morgin letur ein nýggjur klædnahandil, X-size, upp í Havn.

Handilin verður í veghæddini hjá Salong Tótu, har Benetton fyrr var. Hann er fyrst og fremst ætlaður teimum ungu frá 12 ár og uppeftir, men har verður eisini okkurt at finna til øll tey, sum dáma ella hava tørv á stórum klæðum, sum navnið eisini ber boð um.

Stílurin verður mest street-wear, so sum Hip-Hop og skaterklæðir og av merkjum kunna t.d. nevnast: Tribal, Southpole, Enyce, K. Kani, og Pelle Pelle. Eisini verða skateboard at fáa, bæði komplett og í deilum - bretti, hjól, leiði o.s.v. og ymiskt annað frá t.d. World Industries.

Nógv ung - serliga dreingir, keypa nógv klæðir av hesum stíli, skateboard og aðra útgerð á alnótini, tí tað fæst lítið av slíkum í Føroyum. Onkrir handlar hava nakað av slíkum klæðum, men bert eitt lítið úrval.

Úrvalið í handlinum er breitt, og kannst tú her finna klæði frá innast til uttast, buksur, blusur, T-shirts, hettutroyggjur, jakkar, belti, skógvar, lissur, eitt sera stórt úrval av húgvum o.a.. Eisini verður nakað av smykkum at fáa.

Handilin verður ein annarleiðis handil, bæði í útsjónd og í úrvali, verður sagt í tíðindaskrivi.

# Sjeyndi hvør skúlanæmingur er upp í happing

**Í Kvívíkar skúla hava tey nú havt fyrstu virkisætlanina móti happing**

HAPPING
*Tíðindaskriv*

Fyrr í ár var nógv skriving í bløðunum um happing, og einki er at ivast í, at hetta er ein stórur trupulleiki í føroysku skúlunum, sum tað eisini er tað í skúlunum í hinum Norðurlondunum. Seta vit tølini úr hinum Norðurlondunum inn í føroyskt høpi, síggja vit, at av 5.500 næmingum í føroysku barnaskúlunum (í 1. - 7. flokki) eru um 800 næmingar t.e. 15% ella á leið 7. hvør næmingur uppi í happing sum offur ella sum forfylgjari, og 5 % - tað er 20. hvør næmingur ella 280 næmingar - eru uppi í álvarsligari happing úr einari ferð um vikuna til fleiri ferðir um dagin.

Ymisk tiltøk ímóti happing verða gjørd um øll Norðurlond. Svenska skúlalógin áleggur øllum barnaskúlunum at hava eina ítøkiliga virkisætlan (“handlingsplan”) ímóti happing, og virkisætlanir eru í mongum skúlum í hinum Norðurlondunum.

Í vár heitti barnaverndin í Kvívíkar Kommunu á skúlastýrið í kommununi um at taka upp málið um happing, og ein arbeiðsbólkur varð settur. Skúlastýrið heitti á skúlan, og skúlin heitti síðan á læraran og ráðgevaran Bergur Godtfred um at hjálpa við ráðleggingini um tiltøkini og virkisætlanina. Bergur Godtfred hevur í longri tíð arbeitt við einum uppleggi til virkisætlan og umsett eina spurnarkanning, ið byggir á ástøði hjá kenda norska “happingarserfrøðinginum” Dan Olweus.

Í viku 36 gjørdi skúlin eina kanning við spurnarbløðum, og hóskvøldið 5. september var foreldrafundur við fyrilestri og orðaskifti. Foreldrini møttu sera væl upp. So at siga øll heimini vóru umboðað. Leygardagin 7. september var pædagogiskur ráðleggingardagur fyri lærararnar, har lærararnir og rágevarin millum annað arbeiddu við at gera eina virkisætlan móti happing, sum byggir á kanningarnar, foreldratilmælini og nýggjastu vitanina um happing. Síðan hava lærararnir og ráðgevarin arbeitt við ætlanini og fríggjadagin 4. oktober var so fyribils síðsta hond løgd á hana. Virkisætlanin verður seinni fylgd upp við fleiri fundum og viðtalum, og til várs verður ein eftirmeting gjørd m.a. við einari nýggjari kanning. Longu nú eru afturboðanir komnar frá foreldrum um, at virkisætlanin hevur gjørt góðan mun.

# Max 30% feitt

**70% var annað enn feitt, tá føroyskir kokkar vóru á buffétskeiði fyrr í vikuni**

SKEIÐ
*Heri á Rógvi*

Sama dag sum Burger King v.m lat upp í SMS var eisini stórfingin feitt fátøk buffét á skránni í Skúlaheiminum við Marknagilsvegin. Týsdagin og mikudagin vóru nevniliga fjúrtan føroyskir kokkar á skeið á Skúlaheiminum við Marknagilsvegin í Havn.

Skeiðluttakararnir vóru frá sjúkrahúsinum, fyritøkum, hotellum og aðrastaðni frá.



*Luttakarar, starvsfólk á Skúlaheiminum og skeiðleiðarar avmyndaði, eftir at teir síðstu gestirnar høvdu sett buffét borðiskin frá sær.*
*Mynd: Finnu r Justinussen.*

Frá Hotel og Restaurantskolen vóru Laila Hyllekvist og Ingrid Petersen komnar at halda skeið fyri føroysku luttakarunum. Skeiðið var ætlað at geva íblástur til tey ymsu buffét borðini, m.a. jólaborðhaldini. Tá tosað verður um nýggj hugskot, so verður hugsað um “grønar” rættir, har feitti ongantíð má vera omanfyri 30%.

Luttakararnir á skeiðinum vóru:

Otto Rubeksen, Johanna á Tjaldrafløtti, Evida Johannesen, Marita Christiansen, Kirstin Dalfoss, Gundur Fossdal, Uni Gullfoss, Kirstin Andreasen, Bergtóra Høgnesen, Jákup Ziskason, Margretha Ryggshamar, Birgit Nielsen, Ann Askham og Oddvør Skarðhamar.

## Hjørdis Hammer úr Skúvoy Kjærgaard sjómansprestur í Hull

SJÓMANSKIRKJA
*Birita Poulsen*

Danska sjómanskirkjan fær 1. desember ein nýggjan sóknarprest. Tað er Hjørdis Hammer úr Skúvoy Kjærgaard, ið er hálvur føroyingur. Hon verður sjómansprestur í Hull Onglandi og prestur fyri tí føroysku meinigheitina í Stórabretlandi.

Hjørdis Kjærgaard, sum er 44 ára gomul, er sóknarprestur í Lundtofte sókn, og har hevur hon verið seinastu átta árini. Áðrenn ta tíð var hon prestur ár í Avedøre í seks ár.

Hon er sett í starv í samstarvi við Føroysku Sjómanskirkjuna, ið fær eitt ískoyti frá landstýrinum til at seta í starv ein føroyskt talandi prest.

Hjørdis Kjærgaard er sett í starv í eitt fýra ára skeið, og hevur hon í hesum tíðarskeiðinum ábyrgd fyri at skapa samband millum føroyingar í Stórabretlandi og vera teirra prestur. Ímeðan skal hon eisini vera prestur fyri teimum mongu donsku og føroysku sjófólkinum, ið sigla á Humberánni og tæna donsku meinigheitunum í Hull, Newcastle og Grimsby.

Hjørdis er gift við Torben, ið starvast í vindmylluvinnuni. Tey hava tveir synir sum eru 7 og 9 ára gamlir.






